## VB/S umhugsar luttøkuna í 1. deild

Eftir at 1. deildarliðið hjá VB/Sumba leygardagin tapti heili 20-0 fyri AB, heitir felagið nú á møguligar spælarar um vísa seg og koma til venjing.

– Vit fara at loyva okkum at heita á allar teir, sum ikki vilja hava hetta sitandi á sær, um at taka vánaliga úrslitið til sín og at gera nakað við tað. Okur fara tí vegna venjarar og fótbóltsnevnd, at heita á leikarar at taka uppgávuna í álvara og at møta til venjing, stendur at lesa á heimasíðuni hjá VB.

— Tað er meiningsleyst at skipa fyri fótbólti í næstbestu deildini og fáa skammilig úrslit, bara tí at menn ikki tíma at venja. Kemur ikki betri skil í verður liðið tikið úr kappingini.



## Claus hugdi eftir tapi

Coventry spældi í gjárkvøldið í fyrsta umfari av steypakappingini Carling Cup, og Coventry varð sent úr kappingini beinanvegin. Covetry spælir í næstbestu ensku deildini, og mótstøðuliðið var Hereford úr triðbestu deildini. Tað var tó Hereford, sum vann dystin 3-1. Stuart Fleetwood skoraði øll trý málini hjá Hereford, og hann hevði gjørt tað til 2-0, áðrenn Coventry svaraði aftur við einum máli. Hereford fekk tó eitt mál afturat, og so kom felagið víðari í kappingini. Føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen var við til dystin, men hann sat á beinkinum allar 90 minuttirnar.

# U17 hevur úttøkuvenjing

Landsliðsvenjararnir Pætur Clementsen og Finn Johannesen hava sent boð eftir dreingjaspælarum til úttøkuvenjing hjá U17 landsliðnum sunnudagin. U17 skal í oktober mánaði spæla EM-undankapping í Norðurírlandi, og fyrireikingarnar til hesa kapping byrja nú av álvara.

Spælararnir, sum hava fingið boð, eru hesir: Sámal J. Djurhuus, Ási Dam FS Vágar '04, Viljormur Davidsen, Karl Løkin, Petur M. Magnussen, Klæmint A. Olsen, Heri Nesá, Jóhan S. Edmundson, Eyðstein Joensen, André Olsen, Remi Langgaard NSÍ, Rógvi Holm, Fríði G. Jensen, Uni Johannesen, Christian í Garði, Róaldur Jacobsen, Ámund Hansen B36, Gunleif Olsen TB, Martin Tausen, Rani N. Johannessen, Heini Vatnsdal VB, Erland Berg Danielsen Hans Jørgensen Skála, Páll Klettskarð, Eli Simonsen, Daniel Dam, Andrias Ellingsgaard, Jógvan Isaksen KÍ, Høgni Midjord B71, Erling Jacobsen GÍ



**Landsliðið ímóti Skotlandi**
**Málmenn:**
Jákup Mikkelsen, B36
Meinhardt Joensen, KÍ

**Verja:**
Óli Johannesen, TB
Atli Danielsen, KÍ
Janus Joensen, HB
Jákup á Borg, HB
Vagnur Mortensen, HB

**Miðvøllur**
Fróði Benjaminsen, B36
Kári Nielsen, HB
Pauli G. Hansen, Skála,
Claus Bech Jørgensen, Coventry
Bárður Olsen, EB/Streymur
Hanus Thorleifsson, B36
Julian Johnsson, B68

**Álop:**
Hans Pauli Samuelsen, EB/Streymur
Símun Samuelsen, Keflavík
Christian Høgni Jacobsen, NSÍ
Rógvi Jacobsen, HB
Jónhard Frederiksberg, Skála

# FCK í pengadysti

Danska felagið FC Keypmannahavn skal í kvøld royna at vinna seg inn í Champions League kappingina, har veruliga gullið í europeiskum fótbólti liggur. Nógvar spennandi avbjóðingar eru í bólkaspælinum í Champions League, og nógvir pengar eru at vinna. FCK spælir í kvøld seinna dystin ímóti Ajax í Amsterdam, og eftir 2-1 tapi á heimavølli skal FCK skora í minsta lagi tvey mál í Amsterdam í kvøld. Venjarin Ståle Solbakken er bjartskygdur og trýr upp á møguleikan, hóast tað verður trupult, og hann heldur, at kontraálop og deyðbóltsstøður skulu geva FCK neyðugu málini. Kanal 5, sum millum annað sæst á Televarpinum, vísir dystin millum Ajax og FCK í kvøld frá klokkan 19.30.

# KÍ vann toppdystin hjá kvinnum

**Munurin millum tey bæði fremstu liðini í kvinnudeildini vaks í gjárkvøldið upp í 16 stig. Nú verða stigini hálverað, men endaspurturin tykist verða lítið spennandi**

KVINNUFÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið spældu tey bæði fremstu liðini í bestu kvinnudeildini ímóti hvørjum øðrum. AB var á vitjan hjá KÍ í Klaksvík, og hetta var seinasti dysturin hjá teimum í grundspælinum í kvinnudeildini.

Undan dystinum var longu stórur munur millum liðini, tí KÍ hevði 39 stig og AB 26 stig. Men AB hevði møguleikan at minka um munin, áðrenn stigini verða hálverað til endaspælið í deildini.

Men AB megnaði lítið í Klaksvík. KÍ sat á mesta spælinum, og hóast einki mál kom í fyrra hálvleiki, átti heimaliðið at havt fingið okkurt málið.

### Skoraðu fýra ferðir

Í seinna hálvleiki fekk KÍ hol á, og so gjørdist tað tungt hjá AB-liðnum, sum hevði vart væl. KÍ vann at enda dystin 4-0. Kristina Eyðbjørnsdóttir gjørdi trý mál og Bára Skaale Klakstein eitt.

Nú grundspælið er liðugt, er KÍ heili 16 stig frammanfyri nummar 2, sum er AB.

Fýra tey fremstu liðini í deildini skulu nú spæla um FM, og stigini, sum tey hava vunnið sær í grundspælinum, verða hálverað. Tað merkir, at KÍ undan seinastu seks dystunum er 8 stig á odda, og tí er ikki stórur spenningur í deildini, nú endaspurturin verður settur inn.

Umframt KÍ og AB, skulu eisini GÍ og EB/Streymur kappast um FM, og endaspælið byrjar um vikuskiftið.

## Jónas í steypadysti

Danska 1. deildarfelagið Frem skal í kvøld spæla í donsku steypakappingini, og dysturin verður á útivølli ímóti Herfølge, sum eisini spælir í næstbestu donsku deildini.

Fleiri spælarar hjá Frem hava skaðar at dragast við, og tí er ivasamt, hvussu manningin verður til dystin í kvøld. Jónas Tór Næss er ein av teimum, sum ikki spældi seinast.

– Vit hava ein týdningarmiklan dyst ímóti Fremad Amager sunnudagin, so tað kann verða, at vit royna okkurt í steypadystinum í kvøld, sigur venjarin Anders Theil við heimasíðuna hjá Frem.

– Vit vit fara sum altíð á vøllin fyri at vinna, men nú mugu vit síggja, hvørjir spælarar kunnu spæla í kvøld, sigur hann.

## AaB stílar eftir steypagulli

Eisini superligafelagið AaB skal spæla steypadyst í kvøld, og tað verður ímóti FC Fredericia, sum spælir í 1. deild. Og júst tað, at AaB skal spæla ímóti einum liði í lægri deild, fær venjaran at ávara spælararnar. Hann heldur, at teir mugu taka allar uppgávur í størsta álvara, tí ráð er ikki at tapa nakran dyst.

– Vit stíla høgt í steypakappingini í ár, men vit vita, at tað er ikki lætt at gerast steypavinnari, tí tú kanst ongan dyst tapa. Hinvegin er teinurin til gullið í steypakappingini tann stytsti, sigur Erik Hamrén.